legg merki til at framleiðslan hevur verið í aftur-gongd hesi seinastu 20 árini í Norðuramerika, og eisini í eystara Europa. Hinvegin hevur framgongdin verið størst í Miðeystri. Fyri USA er tað geopolitiskt og lívsneyðugt at fáa olju úr Miðeystri. Og fáa teir tað ikki við góðum í vanligum handli, so verður tað við vápnamegi.

### Hvør situr á største oljutilfeinginum?

Men hvussu langtíðarútlitið, eini 10, 20 ella 30 ár fram. **Mynd 3** vísir hvar ávístar oljukeldur (proven crude oil reserves) finnast. Av myndini sæst klárt, hvussu støðan verður um fá ár. Miðeystur fer at fáa eina upp aftur meira avgerandi leiklut í geopolitiska spælinum. Hetta vita aktørarnir í hesum spæli, sum í fyrsta lagi eru USA, ES og Kina.

### Amerikanskur geopolitikkur

USA legði ikki á Irak, tí teir har høvdu biologisk vápn ella hýstu terroristum. Heldur ikki tí Saddam var eitt beist - tað var fyri at tryggja sær atgongd til oljuna, kalt og kyniskt.

USA blakaði ikki Saddam út úr Kuwait fyri at innføra demokrati - tað var fyri at tryggja sær atgongd til oljuna.

USA hóttir Iran, sum kanska hevur heimsins næststørstu ávístu oljukeldur. Ikki tí teir eru muslimar, og kanska ikki eru nóg demokratiskir. Men fær Iran sær atomvápn, so vera teir førir fyri at verja seg, tá USA skal tryggja sær atgongd til oljuna har.

Iran er sum atomveldi ikki nøkur hóttan móti nøkrum, siga granskarar úr danska Forsvarsakademiet. Men verður Iran atomveldi, so verður ringt hjá USA at seta tín vilja ígjøgnum politiskt. Eitt møguligt komandi álopskríggj móti Iran skal førast fyri geopolitiskt at tryggja sær atgongd til iranska oljuna, nú teir ikki hava ein usavinarligan shah Reza Pahlevi at spæla sær við.




*Styrkislutfallið millum Euro og Dollar í farnu viku bleiv merkt av, at meldurstormurin Katrina herjaði í USA og gjørdi nógv størri kaos har, enn nakar hevði væntað. Hetta sigst at vera versta hurricane í amerikanskari søgu. Oljuprísirnir eru í toppi og liggja um 70$ fyri tunnuna. Benzinprísuriní USA er hækkaður meira enn 20%, og vandi er fyri búskaparligari stagnatión. Óvissan valdar, og hetta hevur minkað um virðið á dollara, og euran er tí lutfalsliga gingin upp.*

*Men eisini á tí búskaparliga økinum annars vóru minni góð tíðindir úr USA. Forsøgnir hava higartil væntað ein vøkstur uppá 3,4% uppá árið, men nú tølini fyri annað kvartal eru gjørd uipp, eru útlitini sett niður til 3,3%. Hetta hevur einki við meldurstormin at gera.*

*Á europeisku síðuni eru smáir glottar. Arbeiðsloysistalið er farið eitt lítið sindur niður bæði í Frankaríki og Týsklandi*

# Trý føroysk leitiloyvi



*Kortið sýnir 23. útbjóðingarumfarið á bretska landgrunninum. Faroe Petroleum fekk trý av teimum 152 loyvunum, sum vórðu útlutað*

**Faroe Petroleum fekk trý nýggj leitiloyvi, tá 23. útbjóðingarumfarið á enska landgrunninum varð almannakunngjørt týsmorgunin**

LEITILOYVI
*Jákup Mørk*

- Í útbjóðingini høvdu vit lagt boð inn um fýra ymisk øki, so tá vit fingu trý av hesum, kunnu vit á ongan hátt klaga.

Optimismuni tóktist ikki bila nakað, tá vit um døgurðaleitið týsdagin fingu orðið á Niels Sørensen, sum er leiðari av føroysku deildini hjá Faroe Petroleum.

Í tíðindaskrivi frá ensku stjórnini varð sagt, at sambært metingunum, so goymir bretska undirgrundin framvegis millum 22 og 28 milliardir tunnur av olju, og tí er einki at siga til, at stórur áhugi var fyri teimum 152 leitloyvunum, sum vórðu latin.

### Fyristøðufelag á 8 loyvum

Og tað er sum fyristøðufelag, at Faroe Petroleum nú hevur fingið fatur í nýggju loyvunum. Við hesum er samlaða talið av leitingarloyvum komið upp á 14, harav føroyingar eru fyristøðufelag - operatørar - í átta av loyvunum, og tað hevur sínar avgjørdu fyrimunir við sær, heldur Niels Sørensen.

- Vit royna alla tíðina at leggja okkum eftir, at fólk við stórum serkunnleika verða knýtt at felagnum, og sum fyristøðufelag hava vit betri møguleikar til hetta. Tað sampakkar eisini við vakstrarstrategi'ina hjá okkum, og sum heild kunnu vit siga, at aktivitetirnir í felagnum gerast alsamt størri.

Men ger hetta ikki eisini, at tit verða munandi meira áhugaverdir sum samstarvsfelagar?

- Tað sigur seg sjálvt. Fleiri øki vit eru partur av, og størri servitan vit hava at bjóða. Lættari verður tað at fáa fatur á samstarvsfeløgum, sigur Niels.

Og soleiðis sum oljuprísirnir skikka sær í løtuni, er helst heldur eingin ivi um, at tað er vorðið alt meira áhugavert at samstarva við oljufeløg. Men hóast eksplosivu kurshækkingarnar seinastu vikuna, vil Niels tó ikki staðfesta, hvørt felagið nú setir eyka ferð á sínar ætlanir.

# Team85 á starvsfólkahendur

Lýsingafyritøkan, Team85, hevur á heimasíðu síni boðað frá, at fýra starvsfólk í felag hava keypt helmingin av partapeninginum í fyritøkuni. Fyritøkan er partur av konsernini hjá Dimmalætting, sum síðani stovnanina hevur átt 100% av partapeninginum.

Seinastu tvey árini hevur tó ikki eydnast at fáa raksturin at hanga saman, og í fjør var úrslitið áðrenn skatt eitt hall upp á 691 tkr.

Umframt broyttu eigaraviðurskiftini, er felagið eisini farið undir stjóraskifti. Upplýst verður, at Johnny Gaard, sum hevur stjórnað felagnum seinnu árini, er farin frá, og at Hjalgrim Samuelsen er settur sum fyribils stjóri. Hjalgrim er framman undan eisini stjóri á Dimmalætting.

**mørk**